Skemt



# Gott at stiga seg til

Við hvørt skulu kreativar loysnir til, tá ið okkurt skal gerast. Og hesin bussførarin hevur verið umhugsin, nú hann skuldi undir lúkuna at arbeiða. Tað hevði nevniliga ikki verið so gott at fingið lúkuna í heysin, og tí er gott at hava okkurt at stiga seg til.

## Hvat kann eg gera?

Ein eldri maður fór til læknan til árliga kanning. Lækin hevði ikki góð boð at bera honum.
- Vit hava tíverri funnið út av, at tú ert so sjúkur, at tú hevur bert seks vikur eftir at liva í, segði læknin.
- Hvat? Eg havi tað fínt, havi ikki havt tað betri í nógv ár. Tað kann ikki passa. Er tað einki, sum eg kann gera, spurdi maðurin.
- Jú, tú kundi kanska farið til heilsurøktina og tikið eitt runubað hvønn dag.
- Fer tað gera meg frískan?
- Nei, men so kanst tú venja teg við at liggja í mold.



MYND: POLFOTO

## Lat veturin koma

Summarið hevur verið, sum tað plagar at vera her á okkara leiðum. Nøkunlunda lýtt og grátt. Nú standa heystið og veturin fyri framman, og vit kunnu ugga okkum við, at sambært brasiliumonnum skal hármótin í vetur verða litríkur – rættiliga litríkur. Vit vilja avgjørt mæla til, at eisini føroyingar taka hendan mótan til sín, so veturin kanska verið festligari enn summarið.

## Í RANGASTRÚPAN

**Nakað hált**
Tveir terrormistonktir tiknir í Hállandi
*Vagaportal.fo*

**Ja, teir eru fótbóltsspælarar – ikki svimjarar**
TB trívist illa á Skálafjørðinum
*Portal.fo*

**Kringvarpsgjaldið fer so til makrel**
Løgmaður: Eiga at umhugsa tilfeingisgjald á makreli
*Kringvarp.fo*

**Nakar funnin ov lættur?**
Vigaðir undan og eftir venjing
*Dimma*

**Púra beint!**
Danska uttanríkisráðið meldað fyri grindadráp
*Kringvarp.fo*

**Hvat við Sea Shepherd?**
ETA lýsir vápnahvíld
*Portal.fo*

**Tað er ikki óvanligt**
Vígdis er vaksin við uppgávuni
*Dimma*

**Eystanfyri jarntjaldið?**
Triton skal skjóta eystanfyri
*Portal.fo*

**Onnur fara runt um...**
Hann er ikki hvør sum helst. Hann er nevnliga tann fyrsti, sum hevur runnið tvørtur um knøttin
*3-2 í KvF*

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Tvey forboð afturat, takk!

Nógv, heilt nógv, alt ov nógv, halda nógv, er forboðið í Føroyum.

Tað er sum boðini á skeltinum, ein segði mær frá, hann hevði sæð í Týsklandi. Har stóð: "Alt, sum ikki er loyvt, er forboðið." So er tað sagt!

Men tílíkt, sum átti at verið forboðið, her í Føroyum í hvussu so er, er tíverri ikki forboðið. So sum demokrati og religión. Ja, religión átti at verið forboðin í øllum londum, ikki bara hjá okkum, hóast religión er ódemokratisk.

Bæði eru skaðilig, demokrati og religión, tí tey billa fólki inn, at tey hava ávirkan við at velja og biðja.

Demokrati, fólkaræði, á dett orð, havi eg skrivað um ofta fyrr. Tí er óneyðugt eina ferð enn at skriva hálvan teig av próvgrundum og góðum argumentum yvirhøvur. Tann stutta útleggingin er: lurta eftir einum løgtingsfundi í ein tíma ella so.

Og so leingi, vit hava demokrati, verður eingin loysing, einki fullveldi, sum sagt, einki frælsi, ella tað, tey rópa frælsi. Tí forðar fólkaræðið fyri.

Religiónin, okkara grundlógarásetta statsreligión, fólkakirkjan, er neyðug, sigst, tí hon skrásetur fólk, tá tey eru fødd og í hinum endanum, tá tey doyggja. Hetta kunnu onnur gera, sama um tað so fer at kosta meira.

Og vit vita kortini ikki, hvussu nógv vit eru, og hvørji vit eru. Tí skal nú gangast hús úr húsi at telja fólk og spyrja tey, hvørji tey eru, nær tey eru fødd, og nær tey ætla sær at fara hiðani med alla.

Tvær aldagamlar bøkur eru orsøkin til, at vit hava fólkakirkju, Bíblian og kirkjubókin.

Jarðarferðirnar kunnu kommununar og privatir jarðarferðarsamskiparar kappast um.

Dópur eigur at vera forboðin sum annað svik. Nýføddir óvitar fáa spurningar, sum teir ongan livandi kjans hava at taka støðu til, so onnur svara fyri teir. Og bara einans svarið er loyvt og verður góðkent.

Hjúnaband eigur sjálvsagt at vera útilokað í einum samfelagi, sum kallar seg framkomið. Og kunnu fólk ikki liva uttan í tjóðri, ber til at heita á borgarstjóran ella fútan.

Fólk, sum hava sjálvsálit og áræði, hava ikki brúk fyri religión líka lítið sum fyri opiumi.

At kalla allur heimsins fananskapur stavar frá religión. Tey flestu kríggini til dømis. Religiónin hevur uppfunnið fanan og helviti fyri at hava hann og tað at ræða fólk við. Sjálvandi veit eg, at tað er ógjørligt at forbjóða fólki at trúgva. Tað lukkaðist ikki í til dømis gamla góða Sovjettsamveldinum. Men tað eigur at bera til at áleggja fólki at hava sína trúgv í einrúmi, hurðar og vindeygu afturlatin, og ikki rópa hana út um allar geilar øðrum til ampa og fortreð. Men heldur ikki tað bar til í Sovjettsamveldinum.

Eg var í kirkju í Moskva á páskum í 1981. Ein sálvumikil amerikanskur hallelýjagreðingur geylaði gleðiboðskapin, og vit skrivaðu atheist í gestabókina.

Men Sovjettsamveldið var og er eingin fyrimynd, ikki so?

Trúgvin hjá fólki er eitt mál millum teirra og tann gud, tey hava, og ongan annan.

Almenna rúmið eigur ikki at vera eitt sølutorg hjá trúboðarum.

Sølutorg hjá fólkum, sum halda seg vera betri og reinari og rættvísari og alt møguligt annað gott enn vit hini eru. Vit glataðu sálir, sum fara beint, onga staðni inn á vegnum, til helvitis.

Religiónin skal kortini ikki fáa rokningina fyri alt. Tá Jóhanna slapp at hava sína konu við til døgurðan í Kirkjubø, vildi Jenis eisini hava sína við. Tað slapp hann ikki, og tí sendi hann avboð.

Aftur til forboðini? Vatn hevur dripið fleiri fólk enn øl, sum er sterkari enn 5,8 prosent. Flóðin Mikla til dømis.